## Bumbuspreinging í Keypmannahavn

Ein sólmiðstøð á Eysturbrúgv í Keypmannahavn varð í morgun offur fyri bumbuálopi. Løgreglan í danska høvuðsstaðnum metir, at talan er um eina bumbu, sum varð »plantað«, sum teir málbera seg. Og teir hava eisini sprongt eina tasku, sum var at finna bara 25 metrar frá staðnum, har sólmiðstøðin er. - Vit hava avbyrgt øki. Fleiri løgreglufólk eins og sjúkrabilar og brandbilar eru ávegis til staðið, upplýsir danska løgreglan fyri BT. Blaðið skrivar eisini, at tveir myrkt ílætnir persónar sóust renna frá staðnum stutt eftir eksplosiónina.

*Mynd BT*



# virkið í dag



*- Hóast flakavirkið hevur skift eigarar, eru vit í Skopun líka góð við virkið í dag sum áður, segði Gerhard Lognberg*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Sólarris kom eisini at sigla í brotasjógvum, soleiðis at kommunan noyddist at seta pening til. Hetta gjørdi, at Skopunar kommuna kom at flóta tungt í sjónum, og endin var, at flakavirkið fór á aðrar hendur. Kortini fingu fólk sína úrtøku á virkinum.

Men virkið var ikki verandi opið.

Fyrst í nítiárunum rendi samfelagið seg í svára kreppu, og nýggju eigararnir hildu tað ikki vera ráðiligt at hava virkið opið. Ætlanin var, at tað skuldi tømast fyri maskinur og annan útbúnað, sum skuldi flytast á onnur virkir hjá nýggja eigaranum.

- Men tá søgdu skopuningar kortanei – og vardu virkið, sum teir vóru góðir við. Endin var, at fólkið vann "slagið", legði Gerhard aftrat.

### Sandoy Seafood

Sum tíðin leið, kom tað almenna upp í, og flakavirkið fekk aftur nýggjar eigarar.

- Tað var nú, at vit fingu Sandoy Seafood, og sandoyggjafólk eru líka góð við virkið í dag sum áður, segði Gerhard Lognberg, sum ynskti felagnum og teimum, ið starvast á virkinum, blíðan byrð.

---

eisini senda fólkinum boð um skermin, meðan tey standa og skera.

Martin sigur, at á skrivstovuni kann hann sum virkisleiðari eisini síggja, hvussu gongur hjá hvørjum einstøkum reinskerara.

- Hetta er neyðugt, og soleiðis er tað bara blivið í dag, nú kappingin er hørð, og marginalirnir eru smáir. Góð leiðsla og neyv stýring er eitt krav í hesi vinnu, sigur hann.

Virkisleiðarin sigur, at tað er bara henda nýggja reinskerilinjan, sum hevur hesar møguleikar.

- Gamla linjan, sum eisini verður brúkt, tá ið vit hava nóg mikið av fólki, hevur onga skráseting, leggur Martin Olsen aftrat.



*Martin Olsen er virkisleiðari hjá Sandoy Seafood*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*- Málið við heimasíðuni er eisini at organisera tørvin, soleiðis at politiska eygað kann síggja, at stórur tørvur veruliga er á fólki í fiskiskipa-og útróðrarflotanum, siga Sp/f Kasi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Tørvur á sjófólki fram í ljósmála

**Felagið Sp/f Kasi hevur nú gjørt eina heimasíðu, har reiðarar, skipaeigarar og útgerðarmenn kunnu søkja eftir fólki til skipini. Eisini kunnu fólk, sum leita eftir skipskjansi, skráseta seg á nýggju heimasíðuni**

HEIMASÍÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit vita, at stórur tørvur er á sjófólki í Føroyum. Dagliga eru lýsingar í útvarpi, har reiðarar søkja eftir fólki til skip og bátar.

Tað er hetta, sum hevur ført til, at Sp/f Kasi nú hevur skipað eina nýggja heimasíðu www.neptun.fo, har reiðarar, skipaeigarar, útgerðarmenn og avvarðandi av skipum og bátum annars kunnu søkja eftir fólki.

- Vit hava meylað til reiðarar og onnur um hesa síðu og fáa nýggj svar hvønn dag.

Teir, sum standa aftanfyri Sp/Kasi, siga, at avvarðandi av skipum og bátum, sum eru skrásett á heimasíðuni – fyri eitt lagaligt ársgjald - sjálvi kunnu broyta lýsingarnar alt árið.

### Í ljósmála

- Málið við nýggj heimasíðuni er eisini at organisera tørvin, soleiðis at politiska eygað eisini kann síggja, at stórur tørvur veruliga er á fólki í fiskiskipa- og útróðrarflotanum. Tørvurin er helst nógv størri, enn vit ána, leggja teir aftrat.

Men tað eru ikki bara skipaeigarar og útgerðarmenn, sum kunnu brúka heimasíðuna.

- Fólk, sum hava hug at søkja hýru við skipum og bátum, hava eisini møguleika at leggja sín "profil" inn á síðuna. Hetta er ókeypis. So kunnu tey, sum eru brúkarar av síðuni, leita í profilum.

### Stór undirtøka

Sp/f Kasi sigur, at longu nú hava fleiri teknað seg til heimasíðuna, og felagið roknar við stórari undirtøku so hvørt, sum fólk gerast kunnug við hendan nýggja møguleikan.